Hallur Christiansen, TB:

## - Fingu ikki spælið at koyra

Annar av framherjunum hjá TB, Hallur Christiansen, helt eftir dystin, at TB kanska hevði undirmettt B71 undan dystinum, og at tað kostaði teimum dýrt.

- Vit taka kanska ikki uppgávuna í nóg stórum álvara, og vit spældu í alt ov lágum tempo, haldi eg. Eg haldi eisini, at vit í alt ov stóran mun høvdu hug til at leypa miðjuna um, og av tí sama gjørdust vit ikki nóg vandamiklir, segði Hallur Christiansen.

- Somuleiðis fingu vit ongantíð glið á spælið hjá okkum, og teir stóðu væl á vøllinum og góvu okkum ikki nógvar møguleikar, segði ungi framherjin eftir dystin.

**tn**

Eli Hentze, B71:

## - Vit spældu skilagott

Veteranurin á B71-liðnum, Eli Hentze, var errin av ungu monnunum hjá B71, sum hósdagin syrgdu fyri, at B71 fyri fyrstu ferð í ellivu ár er í hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið.

- Eg haldi, at vit høvdu neyðuga tolið og stóðu væl, og sum heild spældu vit skilagott eftir mínum tykki, segði Eli Hentze.

Veteranurin helt, at tað serliga var í umdystinum, at sandoyingarnir høvdu munin á vertunum, og hann dylur ikki fyri, at teir eru ómetaliga ernir av úrslitinum á Sevmýri.

- Eg haldi, at tað var eitt fantastiska flott avrik av ungu manningini hjá okkum, staðfesti Eli Hentze.

**tn**

TB-B71 2-4(1-1):

# Sandoyingar í hálvfinaluni

**Við sínum fyrsta sigri á Sevmýri síðani 1996 vann B71 sær hósdagin sess í hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið, og so langt eru teir ikki komnir í steypakappingini síðani í 1994**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kristi Himmalfaradag hittust tey bæði liðini, sum í fjør stríddust um at vinna næstfremstu deildina, í fjórðingsfinaluni í steypakappingini. TB og B71 brustu saman á Sevmýri, og tá ið avtornaði endaðu sandoyingar omaná, men neyðugt var at spæla í 120 minuttir fyri at finna ein vinnara.

### Tvøramenn javnaðu í evstu løtu

Í fyrra hálvleiki av dystinum á Sevmýri vóru tað kanska gestirnir, sum vóru teir vandamiklaru, men tað var tó heimaliðið, ið setti hol á. Fyrri hálvleikur var hálvrunnin, tá ið Hallur Christiansen fekk pláss úti í høgra borði til at leggja innfyri, og við handaru stong kom veteranurin Jón Johannesen tuskandi, og hann langaði bóltin í netið til 1-0.

Eftir leiðslumálið var B71 fleiri ferðir nær við at javna, tá ið teir royndu seg við góðum skotroyndum, men Predrag í TB-málinum vísti veruliga, hvør dugur er í honum. Men TB-málverjin noyddist tó at kapitulera beint undan steðginum, tá ið Símun Hansen við einum dreymalangskoti úr 25 metra fjarstøðu, ið tók í samankomingina, áðrenn tað fór í netið, syrgdi fyri, at javnvág aftur var í dystinum.

Útjavnandi málið hjá sandoyingum gav teimum blóð upp á tánna, og teir tóku eisini leiðsluna stutt eftir steðgin. TB misti bóltin í uppspælinum, og Clayton Soares hjá B71 snýtti ein verjuleikara, áðrenn hann gjørdist leysur við Predrag og skoraði trygt.

Nú lá trýstið á tvøramonnum at fáa javnað, og tað ið eftir var av dystinum var fyri ein stóran part eitt langt TB-álop. Men heimaáskoðararnir noyddust tó at bíða heilt til næstseinasta minuttin, áðrenn tað endiliga eydnaðist at koma ájavnt við B71 aftur. Ein bóltur bleiv sendur inn um verjuna hjá B71, og Emanuel Larby fekk akkurát prikað bóltin framvið Símun Rógva Hansen í málinum hjá sandoyingum til 2-2.

Neyðugt var tí við umdysti á tvær ferðir 15 minuttir, og tað var kanska væntandi, at útjavnandi málið hjá TB í evstu løtu hevði "knekkað" B71, men so var ikki. Sandoyingarnir høvdu munin, og teir høvdu eisini nóg mikið av neyvleika til at fáa avgerandi málini. Clayton Soares skoraði til 3-2, tá ið hann fangaði ein bólt í TB-verjuni. Hann sá, at TB-málverjin var staddur nakað uttarlaga, og brasiliumaðurin lyfti hegnisliga bóltin upp um Predrag til 3-2 til gestirnar.

Í seinasta minuttin bleiv tað so 4-2, tá ið Eirikur Poulsen kom á máltalvuna. Beint áðrenn Eirikur skoraði til 4-2, var TB um reppið at javna til 3-3, men Símun Rógvi Hansen í B71-málinum bjargaði meistarliga.

### TB megnaði ikki at skapa dystin

Tað var stórur saknur í teimum báðum, Alexander Jovevic og Daniel Nyarko, á miðvøllinum hjá TB. Báðir tveir eru skaddir, og uttan teir báðar á liðnum, valdu tvøramenn í flestu førum at leypa miðvøllin um, tá ið teir fóru í álop.

Sandoyingar stóðu væl á vøllinum, og hóast teir vóru undir stórum trýsti, so megnaði unga manningin hjá B71 at standa ímóti áhaldandi trýsti, og teir høvdu eisini tol til at spæla bóltin fram eftir vøllinum.

Tað sást aftur í dystinum, at TB vanligani ikki er tað liðið, ið skapar ein dyst, tá ið teir spæla í Formuladeildini, tí teir høvdu ógvuliga ilt við at verða skapandi liðið í dystinum hósdagin. Tá ið B71 so tók leiðsluna í dystinum, gjørdist uppgávan møtumikil hjá heimaliðnum, og tá ið avtornaði endaðu sandoyingar omaná, og teir eru nú klárir til hálvfinalurnar móti gøtumonnum.

### FAKTA UM DYSTIN

**TB-B71 2-4(1-1)**
1-0: Jón Johannesen 22.
1-1: Símun Hansen 43.
1-2: Clayton Soares 50.
2-2: Emanuel Larby 89.
2-3: Clayton Soares 99.
2-4: Eirikur Poulsen 120.
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Ace Markovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Allan Poulsen(50. Niclas Ludvig), Einar Petersen, Birgir Rasmussen(65. Mortan Enni), Olivur Abrahamsen - Emanuel Larby, Hallur Christiansen(55. Búi Mortensen)
**B71:** Símun Rógvi Hansen - Eirikur Poulsen, Bergleif Sólsker, Gert Lydersen, Sverrir Kjærbo, Hanus Clementsen - Tummas Pauli Olsen(71. Jákup Sørensen), Eli Hentze, Clayton Soares, Símun Hansen(91. Magnus Olsen) - Jónsvein Thomsen(58. Johannes Jensen)
**Dómari:** Petur Reinert

# Hepnið fylgdi Milan

**AC Milan megnaði við neyð og deyð at vinna sær sæti í finaluni eftir tveir sera tættar hálvfinaludystir ímóti PSV Eindhoven. Samanlagt endaðu dystirnir 3-3, men við einum máli á útivølli er tað Milan, ið fer víðari**

CHAMPIONS LEAGUE
*Stefan í Skorini*

PSV Eindhoven mátti bíta í grasið eftir hálvfinaluna móti Milan mikukvøldið. Eftir at hava vunnið munin frá fyrra dystinum innaftur miðskeiðis í seinna hálvleiki, sá tað bjart út hjá hollendska liðnum, men í seinasta minutti fekk Milan avgerandi málið, sum sendir teir í finaluna.

Eitt stórt vónbrot hjá PSV, sum hevði verið betra liðið gjøgnum allan dystin. Men liðið misti høvdið í seinastu løtu, tá Ambrosini púra ótarnaður slapp at skora til 2-1. Hetta var mønustingurin hjá PSV.

Nú er sostatt greitt, at tað verða AC Milan og Liverpool FC, ið skulu møtast í Champions League finaluni tann 25. mai á Atatürk Stadion í Istanbul.

Longu eftir átta minuttum fekk PSV fyrsta málið. Tann ótroyttiligi suðurkoreanarin Ji-Sung Park spældi til áleyparan Vennegor of Hesselink, sum royndi at sneiða Stam av. Ístaðin datt bólturin aftur fyri føturnar á Park, og hann bankaði bóltin uppí nettakið aftanfyri Dida.

So var støðið lagt. PSV ætlaði sær ikki at gevast uttan ein bardaga. Hetta kom dátt við hjá Milan, sum var trýst aftur á egna hálvu stórar partar av dystinum.

Tað eydnaðist eisini PSV at økja um leiðsluna, tá Cocu stútaði innlegg frá Lee í kassan, og so stóð alt á jøvnum.

### Ambrosini bjargingarmaður

Milan setti tað seinasta álopið í verk, tá tíðin júst var farin um teir níti minuttirnar. Kaka fór ígjøgnum í vinstru og fekk lagt innfyri til ein púra óvardan Ambrosini, sum skallaði bóltin í kassan. Tað var rættiliga ótrúligt at síggja, hvussu út av lagi vánaligt verjuspælið hjá PSV var í hesum førinum. Kaka slapp ótarnaður at leggja innfyri, og inni í brotsteiginum stóðu tveir Milan leikarar óvardir og bíðaðu eftir bóltinum. Løgið, at PSV gloymdi at verja móti endanum.

PSV svaraði tó aftur, hóast tað nú var ov seint. Vennegor of Hesselink forlongdi ein bólt til Cocu, sum við einum vøkrum fluktara skoraði til 3-1.

PSV skuldi tó hava enn eitt mál fyri at koma víðari. Heimaliðið hevði tíð til eitt álop afturat, men einki spurdist burturúr, og so er tað Milan, sum skal møta Liverpool í finaluni.

**Champions League, 2. hálvfinala:**
**PSV Eindhoven - AC Milan** 3-1 (1-0)
1-0: Ji-Sung Park, 8.
2-0: Phillip Cocu, 65.
2-1: Massimo Ambrosini, 90.
3-1: Phillip Cocu, 90.

# FM í amboðsfimleiki

**Leygardagin tann 7. mai og sunnudagin 8. mai 2005 verða árligu FM kappingarnar í amboðsfimleiki fyri einstaklingar í bólki 1 og 2**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Kappingarnar verða hildnar í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Byrja verður leygardagin kl. 13.00 og sunnudagin kl. 14.00.

Leygardagin verður einstaklingakappingin, tvs. at tá verður kappast um samlaða FM heitið í øllum amboðum. Sunnudagin verður amboðskappingin, tvs. tá verður kappast í hvørjum amboð fyri seg. Einstaklingakappingin leygardagin er samstundis kvalifikatión til amboðskappingina sunnudagin. Seks teir bestu fimleikararnir í hvørjum amboði leygardagin kvalifisera seg til amboðskappingina sunnudagin.

Tey luttakandi feløgini eru: Fok, Støkk, Ljósið og Havnar Fimleikafelag. Hjá gentum luttaka 26 fimleikarar, harav 16 í bólki 1 og 10 í bólki 2. Hjá dreingjunum luttaka 15 fimleikarar, harav 8 í bólki 1 og 7 í bólki 2.

Hetta er tann seinasta kappingin í amboðsfimleiki fyri teir yngru bólkarnar. Seinni í mai mánað verður kappingin fyri teir eldru bólkarnar.